

**TOYOTA COROLLA 1.6 TERRA Aut.Gear**

Skrásetingarnr.: FL 474 KM: 86.000
Árgangur: 08.04.98 Seinast sýnaður: 01.03.05

Kr. 72.000,-



**TOYOTA AVENSIS 2,0 TD** 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: NE 068 KM: 133.000
Árgangur: 18.08.98 Seinast sýnaður: 16.01.04
Viðmerking: Fjarstýrt sentrallás - Elrútar framman

Kr. 94.000,-



**TOYOTA COROLLA 1.6 L/B**

Skrásetingarnr.: GL 088 KM: 103.000
Árgangur: 18.05.98 Seinast sýnaður: 27.10.03

Kr. 78.000,-



**TOYOTA YARIS 1,5 T SPORT 5D 105 HK** 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: RM 603 KM: 55.000
Árgangur: 11.02.02 Seinast sýnaður:
Viðmerking: Fjarstýrt sentrallás - Radio/CD - Leðurróður - Spoilara - Alufelgur - Tokulyktir

Kr. 132.000,-



**TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL**

Skrásetingarnr.: DT 800 KM: 145.000
Árgangur: 12.03.97 Seinast sýnaður: 03.02.04

Kr. 59.000,-



**TOYOTA YARIS 1,3** 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: SB 697 KM: 74.000
Árgangur: 18.09.01 Seinast sýnaður: 22.07.04

Kr. 105.000,-



**TOYOTA COROLLA 1,6 TERRA 5D H/B** 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: SV 161 KM: 38.000
Árgangur: 10.05.02 Seinast sýnaður: 10.05.02
Viðmerking: Elrútar/spegl - Fjarstýrt sentrallás - Radio/CD - Topspoilara - Alufelgur

Kr. 142.000,-



**TOYOTA COROLLA 2,0 LINEA TERRA D-4D** 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: VH 207 KM: 54.000
Árgangur: 27.06.02 Seinast sýnaður: 27.06.02
Viðmerking: Vørubilur - MVG er í bilinum

Kr. 136.000,-



**TOYOTA AVENSIS 1,8 LINEA SOL SED**

Skrásetingarnr.: UV 201 KM: 52.000
Árgangur: 31.10.01 Seinast sýnaður: 31.10.01

Kr. 159.000,-



**DAIHATSU SIRION 1,0**

Skrásetingarnr.: PT 603 KM: 67.000
Árgangur: 31.08.99 Seinast sýnaður: 25.06.04

Kr. 49.000,-

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F


# Gleði og harm



*Tey hava úr at gera við at sortera allan postin henda dagin. Eftir lítlari løtu vórðu omanfyri 400 brøv fingin frá hond til tey ungu og spentu lestrarhugaðu, sum bíðaðu uttan fyri diskin*

**Nógv fingu játtandi svar um upptøku til hægri lestur. Nógv fingu noktandi svar. Og onnur fingu einki svar, tí brævið var ikki komið fram seinnapartin leygardagin. Tey fingu svar sítt seinni**

LESANDI
*Snorri Brend*

**Óðinshædd:** Tað er ein álvarsom løta við stóra Posthúsið í Havn. Klokkan er júst farin av 13 henda leygardagin eftir ólavsøku.

Uttanfyri einar dyr aftan fyri Posthúsið stendur ein kø av ungum fólkum. Tey eru øll komin hagar við einum og sama endamáli: At heinta ein stóran hvítan brævbjálva við donskum frímerki á.

Væl frammanundan hava tey øll sent eina ella fleiri umsóknir til einhvønn danskan lærustovn við fyrispurningi um upptøku við skúlaársbyrjan 1. september.

Nú eru svarini send úr Danmark, og nú er tíðin komin til at vita, um svarið er játtandi ella noktandi.

Postverkið er vanliga ikki opið leygardag. Men í dag hevur tað, sum eina eyka tænastu, sagt frá, at tey lestrarhugaðu kunnu heinta svarini henda seinnapartin millum kl. 13 og 15.

Tí standa tey í kø, og tí kann ein síggja og merkja spenningin, sum er innan í teimum. Hesin eini hvíti brævbjálvin kann gerast tann avgerandi løtan fyri framtíðina.

Ein avgerandi løta í valinum av starvsleið restina av lívinum.

## Tøgn og álvarsemi

Ein bilur kemur niðan móti kø'ini. Ein drongur kemur úr bilinum, og gongur álvarsamur yvir móti inngongdini.

Nú kemur hann fram til diskin og spyr eftir hesum avgerandi brævbjálvanum í hondini.

Tú sært beinanvegin á honum at hetta er ein álvarsom løta fyri hann og framtíð hansara.

- Hvat er navnið?, verður spurt hinumegin diskin. Ein blíðsníðað postkvinna er til arbeiðis henda dagin, saman við fleiri øðrum starvsfólkum, sum hava havt úr at gera við at sortera allan henda postin.

Hesin ungi maðurin sigur navnið við álvarsamari rødd. Spenningurin er í luftini. Hjá honum valdar tøgn. Her skal ikki sigast so nógv annað enn bara navnið.

- Hevur tú nakað bevís um tað?, spyr hon aftur. Hon roynir uttan iva at avdramatisera hesa løtuna mest møguligt.

Jú, hann fer í lumman eftir koyrikortinum. Í spenninginum fløkist hondin í jakkalumman, men umsíðir kemur so mappan fram og við koyrikortinum í.

Postkvinnan nikkar samtykkjandi, og fer í tann stóra bunkan við hvítum brævbjálvum eftir tí einasta eina brævbjálvanum, sum hevur nakað at siga fyri henda unga mannin.

- Ger so væl, sigur hon.

## Upplatingin

Hann tekur brævbjálvan fer út aftur í frísku luftina, framvið eini 20 øðrum ungdómum, sum eru har í somu ørindum sum hann.

Tann stóri spurningurin er nú: Skal hann lata brævbjálvan upp seinni ella beinanvegin?

Hann hevði frammanundan avgjørt, at hann skuldi lata hann upp heima við hús. Hóast hann býr í hinum endanum av býnum, so vildi hann geva sær sjálvum ta tíðina tað kravdist at venja seg við tankan um innihaldið í brævinum.

Men nú, hann stendur við brævbjálvanum í hondini, kann hann snøgt sagt ikki bara sær: Hann má!

Varliga letur hann brævbjálvan upp, og øll hini eygleiða reaktiónina: Var tað eitt ja ella eitt nei!

## Blandaðar kenslur

Hann gevur sær góða tíð, og lesur brævið einaferð enn. Enn letur hann ikki nakað við seg koma.